# Løgmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 22. mai 2024 |
| Mál nr.: | 24/09375-4 |
| Málsviðgjørt: | EM |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Kunngerð um broyting í kunngerð um ættleiðing
(Samstundis upptøka á bíðilista til altjóða og innanlands fremmandaættleiðing)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 117 frá 25. juli 2018 um ættleiðing, verður § 35 orðað soleiðis:

"**§ 35.** Ein umsøkjari við generellari góðkenning sum ættleiðari sambært § 18, stk. 1, nr. 2, kann velja at søkja um innanlands og altjóða fremmandaættleiðing samstundis ella annaðhvørt innanlands ella altjóða fremmandaættleiðing. Ein umsøkjari kann til eina og hvørja tíð broyta sítt val sambært 1. pkt.
*Stk. 2.* Tá ein umsøkjari fær eina generella góðkenning sambært § 18, stk. 1, nr. 2, sendir Familjufyrisitingini málið til Adoptionsnævnet, sambært § 60, uttan so at umsøkjarin frammanundan hevur valt innanlands ættleiðing frá.
*Stk. 3.* Søkir ein umsøkjari um innanlands og altjóða ættleiðing samstundis, verður innanlands ættleiðing mett sum vald frá, tá ið uppskot kemur um eitt ítøkiligt barn gjøgnum tann miðlandi felagsskapin, sambært § 45. Somuleiðis verður altjóða ættleiðing mett sum frávald, tá umsøkjarin hevur tikið av at ættleiða eitt barn, sum Adoptionsnævnet hevur skotið upp í uppskot, sambært § 60.
*Stk. 4.* Adoptionsnævnet og ættleiðingarmiðlandi felagsskapurin kunna hvønn annan um val og frával hjá umsøkjaranum sambært stk. 1-3."

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Løgmálaráðið, 22. mai 2024

**Bjarni K. Petersen**
landsstýrismaður

/ Nella Festirstein